# Toyota reisti bygning í Klaksvík



Ein pylsuvognur syrgdi fyri ábiti til tey, sum vóru til reisigildi hjá Toyota




*Eivindur av Reyni inn í nýreista bygninginum hjá Reyni Service í Klaksvík. Sum veðrið var til reisigildi leygardagin var eingin orsøk til inniloka bygningin*

*Myndir: Bárður*

Leygardagin var reisigildi í nýggja bygninum hjá Toyoyta á Borðoyarvík í Klaksvík.

Samstundis sum seinasta skotið varð latið av í Norðoyatunlinum, kundu Eivind av Reyni og hansara fólk á Reyni Service fegnast um, at nú er handilsbygningurin í Klingrugarði í Klaksvík reistur.

Reyni Service bjóðaði teimum vitjandi pylsur úr einum pylsuvogni, sum tey høvdu sett á økið, og tað riggaði sera væl.

Nógv fólk vóru til reisigildi, og tey kundu millum annað fáa eitt prát við stjóran Eivind av Reyni. Onkrir nýggir bilar vórðu eisini sýndir fram í sambandi við reisigildi.




ÚTSØLA

NOA NOA miniature

BYRJAR MIKUDAGIN 29. JUNI 2005, KL. 08.00

ALT 1/2 PRÍSUR

MIKUDAGIN HAVA VIT OPIÐ TIL KL. 20.00

NOA NOA®
– Tróndargøta –

Sosialurin 341800